# Kríggj rakar tey fátæku og kúgaðu fólkini i Irak mest

**-segði Manijeh Elsa Modi, lesandi, í síni røðu á friðarfundinum**

Góðu øll somul

Hyggja vit at støðuna í Irak í dag, eru tað fleiri spurningar, sum stinga seg upp:

Hevði tað ikki verði gott, at sloppið av við Sadam? Høvdu vit so ikki fyribyrgt framleiðslu av hópoyðingarvápnum, fanga terroristar, og loyst tað Irakiska fólkið úr kúgvan?

Tíanverri, er verunleikin ikki so einfaldur. Vit vita enn ikki við vissu, um Saddam hevur hópoyðingarvápn. Sannlíkt er tó, at hann longu hevur kemisk hópoyðingarvápn. Hevur hann tey, er eitt kríggj just tað, sum kundi framprovokerað nýtslu av hesum. Harvið kann alt Miðeystur koma í vanda.

Tíanverri fer eitt kríggj móti Irak heldur ikki at fyribyrgja alheims yvirgang. Eitt kríggj, við tí neyð og elendigheit, sum fylgir við, er just at spæla teimum mest víðgongdu yvirgangskroppum kortini á hondina. Tess meira elendigheit USA kann fáa skylduna fyri, tess lættari verður tað at fáa ung í Miðeysturi at ofra seg í religionsins misbrúkta navni.

Eftir er at hugsa um tað Irakiska fólkið. Jú, fegin vilja tey sleppa av við ræðuliga einaræðisharran. Tíanverri hevur tað fyrr víst seg at vera lættari sagt enn gjørt at koyra Sadam frá valdinum. Tey, sum verða harðast rakt undir og aftaná einum kríggi, eru júst tey, sum framanundan hava liðið mest: Tey botn fátæku og undirkúgaðu fólkini i Irak.

Jamen, hvat kunnu vit so gera ímóti einaræðisharrum og yvirgangi? Hvat er gróðrarlendi fyri hesum fyribrigdum, og hvat vit kunnu gera, fyri at fyribyrgja teimum?

Eg fari at samanlíkna yvirgang við kriminellan harðskap. Spurningurin er:

Hví hevur t.d. Danmark – eitt land við lágari revsing á hesum øki - eisini lágan títtleika av kriminellum harðskapi? Samstundis sum USA, sum revsar somu brot við heilt upp til deyðadóm, so sera høgan títtleika av grovum harðskapi?




*Torbjørn Jacobsen, tingmaður, og Kristian Magnussen, tingmaður, í fullari semju á Valginum leygardagin*



*Nógv ungfólk vóru til friðartiltakið*

Svarið finna vit kanska í teimum korum, sum Danmark bjóðar børnunum hjá sosialt veikum. Bæði peningarliga og socialt verður stórur dentur lagdur á, at geva børnum ein so tryggan og virðiligan uppvøkstur, sum tilber – sjálvt um summi siga, at “foreldrini ikki hava uppiborið hjálpina”. Við hesi hjálp uppæla vit ikki avskeplaði menniskju, sum eru so ørkymlaði, at harðskapur sýnist einasta gongda leið hjá teimum.

Hetta vil eg kalla “at steðga trupulleikan við rótina”.

Menturnarlig viðurskifti, sum hava ávirkan á, um einaræðisharrar sleppa framat valdinum er, um vit sjálvi eru authoritær í okkara barnauppæling. Lærir tú ikki børnini at hugsa og virka út frá teimum sjálvum, men bert at fylgja tann, sum hevur valdið í familjuni ella onkran fjarskotan lærusetning, er vandi fyri at maktsjúkir leiðarir fáa valdið, til staðar.

Leggja vit okkum eftir, at útrudda bæði likamlig og sálarlig fátækradømi, har vit kunnu, minka vit eisini um vandan fyri yvirgangi og einaræðisharrum.

Hetta er eftir míni meining største avbjóðing hjá okkum øllum.

Tað krevur tíð, orku og skilagóðar langtíðarætlanir – men tað er tað vert!



*Formaður Javnaðarfloksins var millum stig- og luttakararnar*

*Framhald av síðu 15*

Hevði tað verið ov nógv at væntað onkra meira framkomna strategi frá heimsins intelligentasta ”Intelligence”, um tað fyrst og fremst bara ræður um at fáa ein ólátaðan harðskapsmann frá valdinum? Ber tað til at oyða kemisk hópoyðingarvápn, sum kanska ikki fylla meira enn ein margarinpakki, við bumbum og rakettum? Finst veruliga eingin annar útvegur enn at sorla landið hjá einum frammanundan kúgaðum og niðurbundnum fólki? Er tað nakað, sum kann rættvísgera, at túsundavís av hermonnum í bestu árum fara at vera hópoyðingarmenn í einum landi, sum teir einki eiga í? Er tað órímiligt at spyrja, um tær hundraðtals milliardiardirnar av krónum, sum eitt kríggj fer at kosta, ikki kundu farið hópin hentari?

Hesir spurningarnir eru allir settir fyrr.

Men tíverri mugu teir framvegis setast.

*Tí vit vilja ikki hava kríggj við okkum longur.*

Verjukríggið kann eingin verja seg fyri, men einki álopskríggj vilja vit hava við okkum úr tí partinum av verðini, sum vit hoyra til.

Eingin kann longur vera í iva um, at tann, sum vil, kann sum einki spjaða ræðslu og deyða í heiminum í ein mun, sum fær 11.sept. at blikna.

Spurningurin í okkara tíð er ikki so nógv, hvør kann finna uppá tað:

Tann tíðin er farin, tá ríkisleiðarar kundu billa fólkið inn, at heimurin kann býtast sundur í ónd og góð. Einhvør nøkulunda upplýst menniskja man vita, at tað markið gongur ikki millum lond ella einstaklingar, at tað er heldur ein partur av tí førningi, sum øll, sum bera menniskjunavn, bera við sær, uppá gott og ónt.

Spurningurin er heldur, hví nakar kann finna uppá at spjaða ræðslu og deyða - heldur enn vón og lív. Ein partur av svarinum er fordómar, manglandi vitan, religiøs og onnur fanatisma, og tað bøtist ikki við teirri armóð og neyð, sum er einasti heilt vissi ”vinningurin” av einum kríggi. Ein annar partur er tann órættvísi, sum valdar millum heimspartarnar, og sum vit í Vesturheiminum eiga okkara ríkiliga part av ábyrgdini av. Og nógv, nógv annað. Sum einki kríggj bøtir um. Kríggj hevur mannaættin lært seg at dugað betur og betur síðan Káin og Ábel. Men Káin varð friðhalgaður: Longu tá var tað sagt, at svarið til tað blóð, sum rópar av jørðini til himmals (1 Mós 4,10), er ikki enn meira blóð.

Uttanfyri ST-bygningin í New York stendur ein standmynd av einum manni, sum er í ferð við at smíða eitt svørð um til eitt plógjarn. Myndin skal minna á eina elligamla visión, sum jødar og arabar og kristin hóast tíðar- og stað-bundnar munir í øldir hava havt í felag, og er hon frá Jesaja profeti, sum sigur um Guð, at (Jes 2,4 (og Mika 4,3))

*Hann skal døma heidninganna millum og gera miklar*
*tjóðir sættar,*
*so at tær úr svørðum sínum smíða plógjørn*
*og víngarðsknívar úr spjótum sínum;*
*tjóð skal ikk i bregða svørði móti tjóð,*
*og eingin venja seg til orrustu meira.*

Visiónin er framvegis ein visión.

Hon hevur betur uppiborið enn at gerast ein illusión.

Eg haldi, at vit skulu framvegis hava hana við okkum….




**Um vikuskiftið hevur verið skipað fyri ráðstevnuni »Ung í Føroyum 2003«. 60 ung úr øllum Føroyum hava luttikið á stevnuni, sum hevur snúð seg um list av alskyns slag**




*Hedvig Westerlund og Rakel Helmsdal vóru projektleiðarar fyri mentanarstevnuni »Ung í Føroyum 2003«*

*Mynd: Finnur Justinussen*

# Ungdómsmentan í hásætið

UNG Í FØROYUM

*Ingrid Bjarnastein*

– Ungdómurin skal vísa okkum vaksnu, hvat ungdómsmentan er, sigur Rakel Helmsdal, projektleiðari fyri ráðstevnuni »Ung í Føroyum 2003«.

Arbeitt hevur verið miðvíst ímóti hesi stevnu í eitt hálvt ár, og hetta er onnur ferðin hon er á skránni. Øll stevnan sum hon er gongur fyri seg í Norðurlandahúsinum. Hon er bygd upp av verksmiðjum og pallframførslum, og sunnudagin endaði hon við eini almennari sýning, har almenningurin kundi fáa at síggja bæði, hvat ungdómsmentan 2003 er, og hvat tey ungu hava arbeitt við teir seinastu dagarnar.

– Vit hava roynt at lagt okkum eftir ikki at hava tað sama við á hvørjari stevnu. Seinast høvdu vit til dømis teldulist, men tað er skift út við kór í ár. Eisini hava vit skift helvtina av verksmiðjuleiðarunum út, soleiðis at alt ikki verður tað sama, greiðir Rakel Helmsdal frá.

## Yrkislistafólk

Rakel Helmsdal sigur, at eitt av høvuðsendamálunum er at fáa yrkislistafólk at undirvísa, soleiðis, at tey ungu kunnu fáa hóming av, hvat tað er vil siga at arbeiða professionelt innan fyri eitt øki.

– Tey ungu gera av, hvat tað er, tey vilja framføra. Undirvísararnir eru bara har fyri at hjálpa teimum á veg. Undirvísararnir skulu ikki avgera, hvat tað er, tey ungu framføra, men heldur vegleiða teimum.

Pláss er bert fyri 60 luttakarum á stevnuni, og hesu ferð vóru tað 110, sum teknaðu seg. Tískil noyddust fyrireikararnir velja 60 luttakarar burturúr, sum skuldu sleppa at vera við á stevnuni.

– Fyrsta krav var, at tey, sum høvdu okkurt at vísa fram, antin pall-list ella myndalist sluppu við. Tað var ógvuliga ringt at velja burturúr, tí tríggir fjórðingar høvdu okkurt at sýna fram. So tóku vit eisini fyrilit fyri um luttakarin var ov gamal til at luttaka næstu ferð, tí so varð hann tikin fram um aðrar, sum hava møguleika at vera við tá stevnan aftur verður á skránni, sigur Rakel Helmsdal.

Ein bíðilisti varð gjørdur, og tá alt kom til alt, so sluppu øll, sum stóðu á bíðilista við, tí nøkur meldaðu frá. Antin tí tey ikki sluppu til ta verksmiðjuna tey høvdu teknað seg til ella tí tey ikki tordu hóast alt. Allir luttakararnir høvdu okkurt at sýna fram, og heldur Rakel at hetta er ógvuliga bergtakandi.

## Pallframførslur

Stevnan byrjaði fríggjakvøldið, har Annlis Bjarkhamar eftir ætlan skuldi seta stevnuna. Men av tí, at landsstýriskvinnan í mentanarmálum var ov sein til ein bát, náddi hon ikki at verða í Norðurlandahúsinum klokkan 19, sum ætlað, og var tað tí Helga Hjørvar, stjóri í Norðurlandahúsinum, sum setti sjálva stevnuna.

Í setanartalu sínari segði stjórin í Norðurlandahúsinum illum annað, at hon var glað fyri at Norðurlandahúsið kann vera við til at hjálpa teimum ungu at skapa egin mentanarlig avrik.

Ætlanin við mentanarstevnuni er, at tað eru tey ungu, sum skulu fortelja teimum vaksnu, hvat ungdómsmentan er, og varð lagt til brots longu fríggjakvøldið. Tá skuldu tey, ið høvdu okkurt at sýna fram á palli, vísa hinum luttakarunum, hvat tað var tey arbeiddu við.

Her sóu luttakararnir dans, sjónleik, tónleik, sang, yrkingaupplestur, ræðufilm og eisini varð eitt nýmótans ævintýr um kong Magnus, sum hevði trupulleikar av dóttir sínari, sum tosaði ov nógv í fartelefon, lisið upp. Pallframførslurnar fevndu víða, og vóru øll tey ungu opin og ósmæðin.

Seinni fríggjakvøldið hittust luttakararnir við verksmiðjuleiðararnar, har tosað varð um, hvat arbeiðast skuldi við teir næstu 40 tímarnar.